4. umfar í liðkappingini í Judo

Hjá monnum vann Klaksvíkar Judofelag tryggan sigur á Havnar Judofelag

4. umfar av liðkappingini í judo varð leikt um vikuskiftið og vóru úrslitini hesi.

Í dreingjadeildini leikur HJF og SJF.

Hans Jákup Jacobsen og Gunnar Hansen, HJF, vunnu á ávikavist Johannes Hansen og Petur Sigurð Johannesen, SJF, Alex Joensen, SJF, vann á Kristoffer Olsen, HJF, meðan Meinhard Poulsen og Ragnar Justinussen, HJF, vunnu uttan dyst.

Sostatt vann HJF hendan dystin 4-1.

Síðani leiktu dreingirnir hjá Havnar Judofelag ímóti Klaksvíkar Judofelag.

Hans Jákup Jacobsen, Kristoffer Olsen og Meinhard Poulsen, HJF, vunnu á ávikavist John Petersen, Jan í Giljum og Einar Heinesen, KJF, meðan Gunnar Hansen og Ragnar Justinussen, HJF, vunnu uttan dyst.

Sostatt vann HJF hendan dystin 5-0.

Seinasti dysturin hjá dreingjunum var ímillum Sunda Judofelag og Klaksvíkar Judofelag.

Alex Joensen, SJF, vann á Jan í Giljum, KJF, John Petersen vann á Johannes Hansen, SJF, meðan Einar Heinesen, KJF, og Petur Sigurð Johannesen, SJF, vunnu uttan dyst.

Dysturin millum Sunda- og Klaksvíkar Judofelag endaði sostatt javnur 2-2.

Unglingar


Hjá unglingum var ein dystur, og var hann ímillum HJF og KJF.

Bjarni í Dali og Petur Borgarlíð, HJF, vunnu á ávikavist Leon Rasmussen og Oddur Olsen, KJF, meðan Jan Petersen, KJF, vann á Ragnar Justinussen, HJF.

HJF vann sostatt dystin 2-1.

Menn

Hjá monnunum var eisini bert ein dystur, og var hann ímillum HJF og KJF.



Luis Balsa og Magnus Pauli Glerfoss, KJF, vunnu á ávikavist Kim B. Hansson og Olaf Andreasen, HJF, Petur Borgarlíð, HJF, vann á Oddur Olsen, KJF, meðan Heini Klakkstein og Hans Edmund Josephsen, KJF, vunnu uttan dyst.

KJF vann sostatt dystin 4-1.

Næsta umfar verður á Oyrarbakka sunnudagin 25. februar 1996.

André Matras vann DM í tveimum bólkum

Klaksvíkingurin luttók í Danmarksmeistaraskapinum fyri judofólk á byrjanarstøði

André Matras úr Klaksvík, sum nú býr í Danmark, luttók herfyri í stórari danskari judokapping.

Talan var um Danmarksmeistarakappingina fyri judofólk á byrjunarstøði, t.v.s. upp til grønt belti.

André hevur orange belti, so hann slapp at luttaka í kappingini. Hann meldaði til í sínum vektbólki, sum er -78 kg. og harafturat í opna vektbólkinum.

Og væl gekst. André luttók í tilsamans 10 dystum og í meðal vardu teir í tveir minuttir.

Hetta er sera stutt, tí ein judodystur varar í 5 minuttir effektiva tíð, um ikki annar vinnur dystin við Ippon innan ta tíð.

Men tað gjørdi André altso. Hann vann nevniliga allar 10 dystirnar, bæði í vektbólkinum undir 78 kg. og í opna vektbólkinum, og sostatt vann hann tvey gull heiðursmerkir.

André hevur iðkað judo í fleiri ár í Klaksvíkar Judofelag.

Hann var við á dreingjaliðnum hjá Klaksvíkar Judofelag í fleiri ár, men so gavst hann fyri eina tíð. Hann byrjaði tó aftur, og seinasta vetur og í heyst hevur hann aftur verið við at styrkja liðið hjá klaksvíkingum, hesa ferð í mansdeildini.

Um ársskiftið flutti hann til Danmarkar, og har venur hann við einum felag í Jyllandi.

Tað var fyri hetta felag hann stillaði upp til Danmarksmeistaraheittið, og sum áður nevnt vann hann tvær gullmedaljur í hesari kapping.

Harumframt er André við á 1. liði hjá felagi sínum, sum luttekur í donsku 2. deild í liðkappingini.

Einki er at ivast í at André hevur góð evnir til judo, og heldur hann fram, fer hann óiva at gera nógv vart við seg á hægri støði.

André er eitt gott boð upp á føroyskan landsliðsleikara til norðurlendskar kappingar og til Oyggjaleikirnar, har judo vónandi aftur fær møguleika at royna seg.

Lesarabrøv

Enn eitt mistak í landsumsitingini?

Eg vóni at tað var ein prentvilla tá eg herfyri las í Dimmalætting at landsstýrið ætlaði at skifta teldur sínar út við 486 teldur, ið ætlandi skuldu nýta nýggja Operativ Systemið Windows 95.

Grundirnar til at eg vóni at hetta var ein prentvilla eru hesar:

486 Processarin (CPU) er á veg út úr framleiðslu víkjandi fyri tí nýggjara Pentium (80586) eins og 386 er trokað burtur av 486 CPU'num, hví ætlar landsstýrið at skifta til eina maskinu baserað á 486 CPU'in?

At hugsa sær at koyra Windows 95 á einari 100 MHz 486 teldu er ikki eitt gott hugskot, tí hon koyrir eftir mínum tykki alt ov seint. Ja, eg veit at tað verður reklamerað við at WINDOWS 95 kann koyra á hesum og kanska enntá minni teldum, men faktum er at skal ein nýta Windows 95 (við Excel rokniarkinum og Word tekst-viðgerðini), eigur ein at nýta ein Pentium, ið ikki koyrir undir 90 MHz við 16 Mb av RAM.

Hetta er eisini tann minsta teldan í dag, sum kann anbefalast privatpersónum at investera pengar í.

Tá ið Pentium PRO 200 MHz CPU'urin er komin út er tað fullkomuliga láturvert at landsumsitingin ikki í minsta lagi fær sær hetta.

Hví kunnu landsstovnar, skúlar osfr. ikki investera í útgerð, sum ikki er avoldað júst sum hon verður installerað ella áðrenn?

Er tað veruliga neyðugt at endurtaka hetta mistak ferð eftir ferð?

Nei, eg má bara spyrja, tí hetta mynstrið er ikki ókent!

Hevur landsstýrið trupulleikar at finna út av hvørjar teldur tit eiga at investera í, eru tit vælkomnir at biðja um hjálp!

Vinarligast,

Einar Petersen,
Ægishædd 4,
Tórshavn

Farodane-kappingin

FM fyri lið

Eitt umfar í FARODANE-kappingini verður komandi vikuskifti. Í fyrstu deild er kappingin sera spennandi, tí bert trý stig eru millum 3 tey ovastu liðini. Roknast má við at eitt av hesum liðum vinnur FARODANE-kappingina og sostatt verður føroyameistari fyri lið.

Liðið hjá Dánjal P. Mohr hevur 168 stig
Liðið hjá Boga Simonsen hevur 167 stig
Liðið hjá Róa á R. Joensen hevur 165 stig.

Sum vant verður kappingin í Bridgehúsinum í Gundadali og byrjað verður fríggjakvøldið kl. 19.00. Leygardagin verður byrjað kl. 14.00.

Trygt spæl!!!

Tá ein spæir lið kapping ræður serliga um at vinna kontraktina, og ikki sum tá ein spælir parakapping at royna at fáa so nógvar stingir sum til ber. Í eini parakapping ber til at fara niður í eina upplagdari kontrakt, tí ein roynir at fáa ein eyka sting.

S/ -

	♠ 52 ♡ K 87 ◇ AQ106 ♣ Q843	
♠ J83 ♡ A10653 ◇ 9853 ♣ K	N V E S	♠ 109764 ♡ QJ ◇ K7 ♣ 10972
	♠ AKQ ♡ 942 ◇ J642 ♣ AJ65	

Norður	Eystur	Suður	Vestur
		1 NT	pass
3 NT	pass	pass	pass

Útspæl hj 5.

Eystur fær útspælið fyri frúnna og spælir drongin aftur, sum vestan letur ganga til kongin í norðan. Suður má nú ansa eftir at vestur ikki kemur innaftur, tí so fer kontraktin niður. Um vestan hevur rútar kong vinnur kontraktin, tí skal rútari spælast frá sunnan. Spæl so spaðara til sunnan og spæl rútar J, sum eystur fær fyri kongin. Av tí at tað bert verða 3 stingir í rútara, 3 í spaðara og 1 í hjartara, má suður fáa 2 stingir í kleyvara fyri at vinna kontraktina. Tá eystur nú spælir kleyvara, má suður ikki koyra lítlan, men taka við essinum. Um vestan hevur kongin er einasti møguleiki at vinna kontraktina um kongurin er einsamallur. Um eystan hevur kongin fáast altíð 2 stingir. Í hesum førinum situr kongurin einsamallur og kontraktin vinnur 10 stingir.

Spælið er sera áhugavert, tí um eystan ikki hevði spælt kleyvara tá hann kom inn uppá rútara kong, hevði sunnan helst spælt uppá at slutspæla vestan. Sunnan hevði tikið allar stingirnar í rútara og spaðara og síðani spælt vestan inn í hjartara og vóna at vestan varð noyddur at spæla út frá kleyvar kongi. Sum tað situr, hevði hetta ikki gjørt tað at sunnan vinnur sín kontrakt.

Støðan í 1. deild í FARODANE-kappingini er henda:

1. Dánjal P. Mohr	168 stig
2. Bogi Simonsen	167 stig
3. Rói á R. Joensen	165 stig
4. Niels Nielsen	139 stig
5. SHELL (Hans J. Petersen)	127 stig
6. Símun Lassaberg	114 stig
7. Ingi Helmsdal	98 stig
8. Salomon Johansen	87 stig

Støðan í 2. deild í FARODANE-kappingini er henda:

1/2. Ásla Weihe	103 stig
1/2. Theodor Jacobsen	103 stig
3. Josta Olsen	100 stig
4. Óli Holm	91 stig
5. Súsanna Dam	70 stig
6. Hannis Jacobsen	69 stig
7. Hallberg Arnfríðsson	62 stig
8. Jóna Lützen	53 stig
9. Hjalmar Joensen	28 stig

Tá bridgevikuskifti eru í FARODANE-kappingini er almenn parakapping sunnudag kl. 14.00 (grandprix-kapping). Seinastu tíðini hevur kortblandimaskinan hjá F.B.S. verið í ólagi, men nú skuldi trupulleikin verið loystur, tí F.B.S. hevur bílagt eina nýggja blandimaskinu, sum skuldi verið her í hesari vikuni. F.B.S. vónar tí at vit aftur kunnu hava barometurkapping sunnudagin kl. 14.00.